## Eiga at veiða stórhval aftur



Íslendski fiskimálaráðharrin, Einar K. Guðfinnsson, heldur, at íslendingar eiga at taka stórhvalaveiðina uppaftur. Ráðharrin vísir á, at Havrannsóknarstovnurin hevur mælt politikarunum til at loyva monnum at veiða nebbafisk og sildreka, og at vinnan hevur sagt seg vera til reiðar at byrja av nýggjum. Fiskimálaráðharrin ásarrar tó, at semja er ikki í samgonguni um at taka stórhvalaveiðina uppaftur, men einstakir samgongumenn hava tó nevnt møguleikan fyri at leggja málið fyri Altingið kortini, skrivar Morgunblaðið.

## Ikki treytaleyst upp í ES

Á ráðstevnu í síðstu viku umrøddi íslendska Sjómannasambandið kjakið um íslendskan ES-limaskap. Felagið skipaði fyri einari ráðstevnu, og niðurstøðan av orðaskiftinum um ES-limaskapin var, at felagið tekur ikki undir við limaskapi, uttan so at íslendingar varðveita ræðisrættin yvir tilfeinginum í sjónum. Sjómannasambandið setir eisini sum treyt, at íslendingar skulu varðveita ræðisrættin yvir teimum stovnum, sum ferðast um teirra mark so sun norðhavssildin og svartkjafturin.

# Batar hómast í havsbrúnni



**Meðan djúpvatnstrolarin Suðringur seinastu árini hevur veitt stinglaks og langasporl, hevur gingið verri at manna línuskipið Hoyvíking og snelluskipið Kúrberg. Men nú sigla øll skipini aftur, og reiðarin Marner Lisberg sær batar hómast í havsbrúnni, nú prísurin á olju er lækkaður, og líkt er til, at náttúruviðurviðurskiftini í havinum eru vend til tað betra**

VINNUPRÁT
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinastu árini hevur djúpvatnstrolarin Suðringur veitt stinglaks og langasporl at kalla burtur av. Skipið hevur fingið lønandi vinnu burtur úr hesi veiði, samstundis sum hetta hevur verið við til at avlastað royndina undir Føroyum. Øll veiðan er landað í Skotlandi, haðani hon er flutt niður á franska marknaðin, sum keypir bæði fiskasløgini.

Marner Lisberg, reiðari, sigur, at loyvi hjá Suðringi at veiða hesi djúpvatnsfiskasløgini er royndarloyvi, sum verður útskrivað fyri eitt ár í senn.

- Fiskimálaráðið hevur undanfarin ár givið trý royndarloyvi av hesum slagi, men í summar gjørdi Tórbjørn Jacobsen, táverandi fiskimálaráðharri, av sínum eintingum av at skriva út tvey royndarloyvi eftir stinglaksi og langasporli aftrat.

Reiðarin undrar seg yvir hesa avgerð, sum als ikki samsvarar við fiskifrøðiligu ráðgevingina.

- Tað tóktist okkum undarligt, at júst Tórbjørn Jacobsen tók hetta stigið, tá hann meira enn nakar annar landsstýrismaður í fiskivinnumálum hevur lagt upp til at fylgja fiskifrøðiligu ráðgevingini.

### Ikki grundarlag

Marner Lisberg sigur seg als einki at hava ímóti teimum feløgum og skipum, sum landsstýrismaðurin læt hesi nýggju royndarloyvi til.

- Eg haldi bara ikki, at grundarlag er fyri fleiri nýggjum royndarloyvum, tí tað vísir seg, at fiskiskapurin eftir slíkum djúpvatnsfiskasløgum roynist ikki, um royndin verður ov stór.

Landsstýrismaðurin segði, at hann hevði útskrivað hesi loyvi, tí tvey av trimum skipum, sum høvdu royndarloyvi, at kalla ikki høvdu veitt stinglaks og langasporl í ár. Tórbjørn vísti eisini á, at hesi loyvi, sum kortini bert eru galdandi í eitt ár í senn, kanska kundu bøtt eitt sindur um støðuna hjá djúpvatnsflotanum.

Hini bæði skipini, sum upprunaliga høvdu hesi royndarloyvi, vóru Rasmus Effersøe, sum nú er seldur og Phoenix, sum er seldur á tvingsilssølu, og sum Føroya Banki nú eigur.

Skipini, sum Tórbjørn Jacobsen gav nýggju royndarloyvini, vóru Roc Amadour og Niels Pauli.

### Fleiri tóvtímar

Marner Lisberg sigur, at royndin hjá Suðringi eftir stinglaksi og langasporli mest hevur verið á leiðunum vestur av Føroyabanka.

- Hetta hevur faktiskt rigga rímiliga væl í mun til tað at fiska upsa.

Hann ásannar tó, at fiskiskapurin eftir stinglaksi og langasporli kanska ikki óvæntað er minkaður, sum árini eru liðin. Hetta er nakað, sum eyðkennir djúpvatnsfiskasløg, sum eftir øllum at døma gerast seint kynsbúgvin og soleiðis eisini nørast seint.

- Í ár hevur Suðringur fiskað 1700 tons í 240 dagar, og í fjør fekk skipið eisini 1700 tons, men bert í 208 dagar. Hetta bendir á, at stinglaksur og langasporl ikki tola serliga harðaroynd, leggur reiðarin aftrat.

Einir 10-11 mans eru við Suðringi hvønn túrin, men annars eru einir 15 mans knýttir at skipinum.

Skipari í løtuni er Ólavur Kjærbo, ið er sumbingur, sum býr í Øravík.

### Ikki so dapurt

Marner Lisberg sigur, at dýra oljan hevur verið ein tungur burður í hesum árinum, men hann fegnast um, at prísirnir eru lækkaðir.

- Jú, hetta hevur verið tungt, men eg haldi ikki, at vit skulu síggja so dapurt upp á framtíðina.

Reiðarin heldur, at nú oljuprísirnir eru lækkaðir munandi, tó at teir framvegis eru høgir, sær betri út hjá stórum parti av fiskiflotanum.

- Fólk gloyma so skjótt, og eg trúgvi, at tá vit koma út á várið, hava mong longu gloymt, hvussu trupult tað var, meðan oljuprísirnir vóru í hæddini. Men hetta hevur virkuliga verið ein trupul tíð, sigur hann.

Marner sigur, at inntøkan hjá manningini hevur verið rímiliga góð, tó at skiparaksturin hevur verið tungur.

- Nú vóna og vænta vit, at árið 2009 fer at roynast betri hjá djúpvatnstrolarunum og hjá fiskiflotanum sum heild, leggur hann aftrat.

### Øll skipini sigla

Marner Lisberg er eisini reiðari á línuskipinum Hoyvíkingi og snelluskipinum Kúrbergi, men hesi bæði skipini hava ligið ein stóran part av árinum, tí trupulleikar hava verið at mannað tey.

- Tað hevur verið trupult at manna línuskipini, nú so nógv virksemi hevur verið í landinum yvir eina longri tíð. Men eftir at vit fingu

